Mála Eiðis Kirkju

Eiðis Kirkja verður umvæld. Umvælingin hevur av ymsum orsøkum verið drúgv. Og rættiliga nógv dýrari, enn kirkjuráðið hevur ráð til

VIÐLÍKAHALD
Edvard Joensen

Eiði: Teir mála Eiðis Kirkju innan. Tveir mans ganga uppi í erva við penslum. Tað verður drúgt, láta teir at.

Tað er ikki løtuverk at mála Eiðis Kirkju innan. Sum so mangar aðrar kirkjur er hon eitt satt listaverk, og hvør smálutur skal gerast aftur, sum hann var, áðrenn umvælingin byrjaði.

Tað verður kínt og kelað. Klappað og diggað. Men tað kann einhvør skilja, at farast skal vandaliga um, og at tað má taka sína tíð. Millum annað málningurin av lambinum yvir altarinum, sum eiðismaðurin Niels Kruse hevur málað, er serstakur, og neyðugt hevur verið at fingið konservatorar úr Danmark at umvæla hann.

Men tað er ikki øðrvísi enn væntað við málingararbeiðinum. Hinvegin hevur annað arbeiði í kirkjuni tikið tíð. Eiðisfólk eru farin a ótolnast eftir at sleppa aftur í kirkju. Hon hevur nú verið stongd í umleið hálvtannað ár orsakað av umvælingini.

Málningurin av lambinum er serstakur og mátti umvælast av konservatorum úr Danmark

Mynd: Edvard Joensen

Millum annað skal alt gólvið skiftast út. Kirkjuráðið helt frá byrjan, at best var at skifta alt, sum tað var, beinanveg, men fekk ikki viðhald frá øðrum pørtum, sum innblandaðir vóru í umvælingina.

Seinni hevur tað víst seg, at soleiðis gjørdist tað kortini. Alt gólvið verður nú skift út, hóast tað fer at taka longri tíð enn ætlað. Millum annað vísti seg, at nøkur av undirsløgunum eisini vóru so illa farin, at tey máttu skiftast út.

Alt í alt er arbeiðið dýrkað munandi í mun til tað, kirkjuráðið hevði væntað og átti pengar til.

Tað hevur so gjørt, at Føroya Stiftsstjórn hevur tikið um endan og leggur út úr Kirkjugrunninum fyri at fáa arbeiðið liðugt.

Hans Jacob Joensen, biskupur, sigur, at Stiftsstjórnin hevur gjørt ymsar broytingar í upprunaligu ætlanini. Millum annað vórðu tilboðini upp á málingaarbeiðið gjøgnumgingin av nýggjum. Tað endaði so við, at arbeiðið varð latið einum málarameistara, sum í grundini ikki gav nakað tilboð, men bara eina ætlan yvir, hvat tað fór at kosta at mála kirkjuna.

Kirkjan er nevniliga soleiðis vorðin innan, sigur biskupur, at tað er øgiliga ringt at meta um, hvussu langa tíð arbeiðið tekur. Og tí er ringt at geva bindandi tilboð. Tað vísti seg eisini, at innkomnu tilboðini vóru givin soleiðis, at teir, sum buðu, høvdu lagt uppfyri.

Nú Stiftsstjórnin er komin uppí, verður mett, at einar 200.000,- krónur kunnu sparast bara við málingararbeiðinum. Eisini annað, sum ætlað varð frá byrjan, er útsett, sigur biskupur.

Eiðis Kirkja verður 120 ár í heyst, og vónin er, at hon verður klár til ta tíð. Men á Eiði taka tey ikki nakað fyri givið, tá tosað verður um kirkjuumvæling.

Menningartarnað á legu í Danmark

Í gjár fóru trý menningartarnað ungfólk saman við leiðara á legu í Danmark. Tað er Reyði Krossur Føroya, sum skipar fyri ferðini

ÚTFERÐ
Edvard Joensen

Trý ungfólk í aldrinum 12 - 15 ár fóru í gjár saman við einum leiðara á altjóða ungdómslegu í Ringkøbing í Vesturjyllandi. Tað er Reyði Krossur Føroya, sum skipar fyri ferðini úr Føroyum.

Í Danmark er tað eisini Reyði Krossur, sum skipar fyri leguni. Hon verður hildin í samband við, at Reyði Krossur í Ringkøbing hevur virkað í 100 ár á staðnum.

Á leguni, sum er frá 17. til 25. juli, fara menningartarnað úr 14 londum at hittast. Tey verða upp til trý úr hvørjum landi, eins og tey eru úr Føroyum.

Luttakararnir fáa høvi at uppliva ymiskt á leguni. Millum annað verða útferðir gjørdar, eitt nú í Legoland, eins og tey eisini fáa vitjan av løgreglufólki á rossabaki, sigur Reyði Krossur Føroya í tíðindaskrivi í samband við, at føroysku luttakararnir fóru avstað í gjár.

At Reyði Krossur Føroya sendir hesi fólkini á legu, er eisini eitt íkast til, at foreldrur og onnur avvarðandi trygt kunnu lata tey fara út at ferðast.

Ferðaleiðari er Diana Mouritsen, sum er samarittur hjá Reyða Krossi Føroya og hevur arbeitt við menningartarnaðum fólki. Hon lesur í løtuni pedagogikk í Århus, men er í Føroyum í summarfrí.

Part av hesi summarfrí síni brúkar hon so - sjálvboðin - upp á at fara við hesum ferðalagnum til Danmarkar.

Tiltakið verður fíggjarliga stuðlað av Atlantic Airways, Jólamerkjagrunninum, Frímerkjadeildini og Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, sum Reyði Krossur takkar fyri stuðulin, verður sagt í tíðindaskrivinum.

Reyði Krossur lýsti fyrr í mánaðinum við einum tiltaki í Vágsbotni, har millum annað var ætlanin at hava bókatombola. Tað tiltakið varð útsett, men veðrur hildið komandi leygardag ístaðin.

So leygardagin tann 21. juli fer at bera til hjá fólki at stuðla Reyða Krossi Føroya, sum fer at hava loppumarknað og tombola í Vágsbotni frá klokkan 11 fyrrapartin til klokkan 17 seinnapartin.

Prædikan verður fyrireikað í Múla

Ólavsøkuprædikan í ár verður fyrireikað í Múla. Hans Eiler Hammer, prestur, luttekur saman við familju síni í útvarpstiltakinum hjá studio Pegasus, ið inniber, at tríggjar familjur skulu búleikast saman á primitivan hátt í eina viku í útdeyðu bygdini

ÓLAVSØKUPRÆDIKAN
John Johannessen

Prædikan í dómkirkjuni ólavsøkudag í ár verður helst merkt av, hvussu tað er at liva á primitivan hátt tætt upp at náttúruni og uttan samskifti við umheimin.

Presturin, sum skal halda ólavsøkuprædikuna, luttekur nevniliga í løtuni saman við familju síni og tveimum øðrum pørum í Robinson líknandi tiltakinum hjá Studio Pegasus, um at lívbjarga sær í útdeyðu bygdini, Múla, í eina viku. Uppihaldið í Múla skal síðani sendast sum útvarpssending í Útvarpi Føroya í vetur.

Hans Eiler Hammer, prestur, má fyrireika ólavsøkuprædiku sína í Múla. Hann er nevniliga ein teirra, ið er við í útvarpstiltakinum, um at liva á primitivan hátt í eina viku í Múla

Mynd: Eyðun Klakstein

Tættari skapanarvekinum

– Vit komu til Múla í gjár og skulu vera her í eina viku. Vit liva á primitivan hátt og skulu sjálv fáa allan mat til vega. Um eina løtu skal eg út at fiska døgurða, og annars mjølka vit og taka egg frá hønunum.

Hetta er ein nógv ørðvísi gerandisdagur, og eg rokni við, at hann kemur at merkja ólavsøkuprædikuna hjá mær, sigur Hans Eiler Hammer, prestur, í fartelefonini úr Múla.

Hans Eiler Hammer hevur annars ikki loyvi til at samskifta við umheimin. Fyrsta boð í Múla er nevniliga »Tú mást ikki hava fartelefon«. Men tað eydnaðist kortini Sosialinum umvegis fyrireikararnar av tiltakinum at fáa orðið á prestin.

– Eg havi enn ikki hugsað so nógv um ólavsøkuprædikuna. Men eg rokni við, at eg fari at fáa íblástur higani. Vit, sum eru við í hesum tiltakinum, liva so tætt upp at náttúruni. Tað ger, at vit læra at hugsa um hini, bæði fólk og kríartúr. Og tað, rokni eg við, kann geva íbástur til prædikuna, sigur Hans Eiler Hammer.

Ítróttin skal við

Men tað verða kortini ikki bert upplivingarnar í Múla, ið koma at merkja ólavsøkuprædikuna. Hans Eiler Hammer sigur, at hann longu hevur gjørt av, at ítróttin skal fáa eitt sindur av plássi í ólavsøkuprædikuni.

– Ólavsøkan er ítróttarstevna burturav, og tí skal pláss eisini vera fyri ítróttini í prædikuni – í hvussu er innleiðingsvís. Men í hvussu stóran mun, veit eg ikki, fyrr enn eg seti meg at skriva, sigur Hans Eiler Hammer.

Bundnað evnið til ólavsøkuprædikuna í ár er úr Matteus, og snýr seg um at taka upp krossin og fylgja Jesusi. Og tilfar til hetta roknar Hans Eiler Hammer at finna í uppihaldinum í Múla.

– Sum eg segði, liva vit ógvuliga tætt at skapanarverkinum. Og vit læra at liva tætt saman við fólkum, vit ikki hava hitt fyrr. Tað er óvguliga uppbyggjandi, og tað gongur fínt, sigur Hans Eiler Hammer.

Sóknarpresturin í Klaksvík sigur, at konan og hann høvdu ætla sær at halda eina ørðvísi summarferiu í ár, og tá tey sóu lýsingina eftir fólki til útvarpstiltakið, vóru tey beinan vegin samd um at seta seg við telduna at skriva ein teldupost, um at tey høvdu hug at vera við.

Beint eftir, at Sosialurin í gjár tosaði við Hans Eiler Hammer, skuldi hann út at fiska døgurða til øll 13 fólkini, sum eru við í tiltakinum.

– Hetta er stuttligt. Nú verður tað veruligt fiskarí í staðin fyri mannafiskarí, segði Hans Eiler Hammer, sóknarprestur, skemtandi.

Vil menna børn við vakurleika

Útbúni dekoratørurin, Birita Petersen, hevur latið upp barnahandil í Sandavági, sum hon nevnir Piff Paff Puff. Hon sigur seg leggja dent á vakurleikan fram um tað handilsliga

HANDIL
John Johannessen

Børn mennast av vøkrum umhvørvi.

Hetta heldur Birita Petersen, sum er útbúgvin dekoratørur og hevur latið ein handil upp í Sandavági við barnaklæðum og innbúgvi til barnarúm.

– Handilin hjá mær er skipaður eftir einum dekorationsprinsippi. Tað vil siga, at eg leggi dent á vakurt umhvørvi fram um tað handilsliga, greiðir Birita Petersen frá.

Hon greiðir frá, at einki handilsinnbúgv er í handlinum, men í staðin líkist eitt horn einum barnakamari við einari uppreiddari gamlari føroyskari barnasong, eitt horn er fylt við ymiskum ljósareyðum vørum og eitt horn er fylt við ljósabláum.

– Eg royni geva viðskiftafólkunum íblástur til at hugna um barnakømurini. Og tað haldi eg eisini vera ógvuliga týdningarmikið. Meðan føroyingar fyrr hildu, at tað var stovan, ið skuldi vera vøkur, haldi eg, at tað eru barnakømurini, ið skulu vera vøkur. Tí børn mennast av vakurleika, sigur Birita Petersen.

Birita greiðir okkum eisini frá, at hon umboðar eina bretska fyritøku, ið selur hugnaligt, romantiskt tapet til barnakømur í staðin fyri vanligu Pokémon og Disney tapetini. Eisini bjóðar Birtia sær at hjálpa fólki at innrætta barnarúmið.

Birita Petersen hevur latið ein ørðvísi barnahandil upp í Sandavági

Mynd: Edvard Joensen